*Mál- og avrikssáttmáli millum*

# *Heilsutrygd og Heilsumálaráðið*

*2012*



HEILSUMÁLARÁÐIÐ & heilsutrygd

# Innihaldsyvirlit


Visión: ... 3

Missión: ... 3

Inngangur: ... 4

Endamálið hjá Heilsutrygd er: ... 5

Fíggjarviðurskifti: ... 6

Starvsfólkaviðurskifti: ... 7

Arbeiðsøki og kjarnuøkir: ... 8

Heilsutrygd hevur tvey kjarnuøkir: ... 8

Kjarnuøki 1 umfatar: ... 8

Kjarnuøki 2 umfatar: ... 9

Onnur týdningarmikil økir: ... 9

Samstørv: ... 10

Framhaldandi virksemi hjá Heilsutrygd ... 11

- At menna Heilsutrygd sum sjálvstøðugan stovn ... 11
- KT-skipan ... 12
- Starvsfólkamenning ... 13

Heilsutrygdarprógv ... 14

Verkætlan í 2012 ... 15

Heimasíða ... 15

Talva yvir virksemi hjá Heilsutrygd í 2012 ... 16

## Visión:

Visiónin er okkara leiðstjørna.
Vit vilja vera:

- kend fyri at veita eina vinarliga, rættvísa, skjóta og góða tænastu,
- ein stovnur, sum allir borgarar, samfelagið og samstarvspartar hava fult álit á.

## Missión:

Missiónin er eitt val av átøkum, sum skulu ganga hond í hond við ásetingunum í visiónini.

Heilsutrygd skal veita øllum borgarum landsins eins góðar tænastur, og allir borgarar skulu kenna seg væl, tá teir brúka tænastur frá Heilsutrygd.

Heilsutrygd rindar og veitir ískoyti sbrt. Løgtingslóg um almenna heilsutrygd og viðkomandi kunngerðum.

Heilsutrygd raðfestir sera høgt at avgreiða øll mál og rokningar so skjótt sum gjørligt. Avgreiðslutíðin skal fyri allar vanligar avgreiðslur í mesta lagi vera ein vika.

Heilsutrygd ynskir eisini at ávirka og veita landsmyndugleikum, stovnum og øðrum fakfólkum ráðgeving og viðkomandi upplýsingar – tó uttan at fara útum lógarinnar heimildir við viðkvæmum upplýsingum.

Heilsutrygd skal miðvíst arbeiða fram ímóti at betra tænastustøðið, hækka fakliga støðið við m.a. at hava starvsfólk við røttum royndum og útbúgvingum og skipa fyri viðkomandi skeiðum og eftirútbúgvingum.

Á økjum, har eingir sáttmálar eru, skulu sáttmálar gerast.

Heilsutrygd skal vera eitt gott og stimbrandi familjuvinarligt arbeiðspláss, har starvsfólk trívast.

## Bygnaður

Heilsutrygd varð sett á stovn hin 1. januar 2010. Heimildin er í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009. Heilsutrygd er skipað sum sjálvstøðugur stovnur undir Heilsumálaráðnum.

Heilsutrygd er almenn heilsutrygdarskipan, sum skal tryggja øllum borgarum eina samhaldsfasta almenna heilsutrygd, har allir borgarar verða javnsettir viðvíkjandi inngjaldi og tænastum.

Stovnurin hevur ymiskar álagdar uppgávur sbrt. løgtingslóg um almenna heilsutrygd. Stovnurin hevur eisini yvirtikið teir sáttmálar og tær avtalur, sum áður vóru við Meginfelag Sjúkrakassa Føroya, MSF.

Nýggir sáttmálar skulu gerast, og fleiri av verandi sáttmálum skulu endurnýggjast.

Virksemið hjá stovninum er enn nýtt, og lógin er nýggj. Tí verður neyðugt við tillagingum, fyri at fáa stovnin at virka enn betur, og fyri at betra tænastuna til borgaran.



## Endamálið hjá Heilsutrygd er

- at veita tær tænastur, heilsutrygdarlógin áleggur og at halda játtanina sambært fíggjarlógini,
- at tryggja øllum borgarum landsins eina skjóta og góða tænastu innan øll tey økir, sum eru áløgd stovninum,
- at veita øllum sáttmálapørtum eina skjóta og góða tænastu, har avgreiðslutíðin er so stutt sum gjørligt – í mesta lagi fimm yrkadagar fyri allar vanligar avgreiðslur,
- at vera ein brúkaravinarligur stovnur, har borgarin eisini fær møguleika fyri at avgreiða fleiri av sínum viðurskiftum skjótt og ómakaleyst umvegis heimasíðu stovnsins.





## Fíggjarviðurskifti

Sbrt. løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd frá 23.12.2011 er ásett, at heilsutrygdargjaldið fyri 2012 skal vera kr. 265 um mánaðin. Við somu lógarbroyting fellur eisini ásetingin burtur um, at fólk við niðursettari pensjón verða frítikin fyri at gjalda. TAKS krevur hesar pengarnar inn.

Mánaðardeild fíggjarætlan fyri 2012 verður løgd, tá vit kenna játtanarkarmin fyri 2012, so lættari er at samanbera nýtslu og játtan. Hetta fyri neyvari at tryggja, at játtanin heldur, ella fyri at kunna boða frá í góðari tíð, um tað vísir seg, at játtanin ikki fer at halda.

Við støði í játtanini verður ein ætlan løgd fyri, hvat verður raðfest í árinum.

Telduskipanin skal mennast enn meira, og hol verður sett á arbeiðið at raðfesta og kravfesta eina felags telduskipan fyri alt virksemið hjá Heilsutrygd. Metast skal eisini um kostnað, hvussu farast skal fram, og hvørja skipan og hvørjum veitara arbeiðast skal við frameftir.

Sbrt. lógarbroyting er ásett, at allir persónar, sum eru fevndir av lógini, fáa heilsutrygdarprógv í 2013. Heilsutrygdarprógvið kann nýtast sum skjalprógv viðvíkjandi rættinum til veitingar sbrt. lógini.



## Starvsfólkaviðurskifti:

Áðrenn Heilsutrygd varð sett á stovn, varð mett, at 8-10 starvsfólk skuldu mannað stovnin. Harafturat varð mett, at 1- 2 starvsfólk skulu taka sær av málsviðgerð av hjálparráðum.

Starvsfólkatalið er 9 í fulltíðarstarvi, umframt eitt hjálparfólk, sum hevur verið í starvi alt árið 2011. Hesi 9 starvsfólkini eru: 4 avgreiðslufólk til tað virksemið, sum sjúkrakassarnir primert avgreiddu áður (av hesum er ein skrivstovunæmingur), 1 starvsfólk til málsviðgerð av hjálparráðum, 1 fíggjar- og fyrisitingarleiðari, 1 leiðslufulltrúi, 1 KT-mennari og 1 stjóri. Nakrar tímar um vikuna vaskar vaskikonan, sum eisini vaskar fyri Nema.

Eingi nýggj starvsfólk eru sett í 2011 og ongin er sagdur ella farin úr starvi.

Ongar ætlanir eru um at seta fleiri fólk í starv í 2012. Hjálparfólkið verður eisini í starvi nakrar mánaðir inn í 2012.



## Arbeiðsøki og kjarnuøkir

Allir borgarar, sum eru skrásettir í føroyska fólkayvirlitinum, eru fevndir av Heilsutrygd, tí kann sigast, at arbeiðsøkið er kring alt landið. Skrivstovan er í Klaksvík.

### Heilsutrygd hevur tvey kjarnuøkir

1. At umsita og avgreiða tann partin, sum sjúkrakassarnir áður gjørdu. Herundir eisini at veita upplýsingar o.a. til ráð og stovnar.
2. At umsita og viðgera umsóknir um hjálparráð.

### Kjarnuøki 1 umfatar

- Rinda fyri viðgerð hjá kommunulækna
- Veita ískoyti til keyp av tilskotsheimilaðum heilivági
- Veita stuðul til uppihald á eftirbataheimi
- Endurrinda gjald til ferðing til og frá lækna og jarðamóðir
- Rinda gravarhjálp
- Rinda ískoyti til brillur
- Rinda ískoyti sbrt. § 8 í lógini til viðgerð hjá:
    - tannlækna
    - kiropraktori
    - statsautoriseraðum tannrøktara

Við ávísing frá lækna, verður ískoyti veitt til gjald fyri viðgerð hjá:

- serlækna
- fysioterapeuti
- ergoterapeuti
- sálarfrøðingi
- statsautoriseraðum fótterapeuti

### Kjarnuøki 2 umfatar

- Rinda ískoyti til ávís hjálparráð, sum er liður í viðgerð, ella sum er til persónar, sum ikki hava varandi tørv á hjálparráði.
- Rinda tilskot til kostískoyti, merkivørur o.a., sum lækni hevur ávíst í sambandi við viðgerð av sjúku ella álvarsliga viknaðum persónum.

### Onnur týdningarmikil økir

- Møguliga umsita skipanina við profylaksum, sum eru fyribyrgjandi viðgerðir fyri børn og eldri fólk.
- Fyrireika útgávu av heilsutrygdarprógvi, sum allir borgarar, fevndir av lógini um almenna heilsutrygd, skulu hava í 2013.
- Menna telduskipanir, mannagongdir o.t. frameftir.
- Arbeitt verður við at gera langtíðaravtalu um hølisviðurskiftini.

## Samstørv

Heilsutrygd samstarvar við fleiri ymiskar stovnar, viðgerðarstovur og fyritøkur. Nevnast kunnu:

- Apoteksverk Føroya
- Sjúkrahúsverk Føroya
- Kommunulæknafelag Føroya
- Føroya Tannlæknafelag
- Fysioterapeutfelag Føroya
- Ergoterapeutfelag Føroya
- Føroyskir Sálarfrøðingar
- Serlæknafelag Føroya
- Almannastovuna
- Heilsumálaráðið
- Hvíldarheimið Naina
- Kiropraktorar
- Fótterapeutar
- Privatar borgarar
- o.o.



## Framhaldandi virksemi hjá Heilsutrygd

### At menna Heilsutrygd sum sjálvstøðugan stovn

Heilsutrygd setir sera frammarlaga at menna stovnin til ein vælvirkandi, sjálvstøðugan og brúkaravinarligan stovn. Virksemið er grundað á løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd.

Arbeitt verður við at endurnýggja sáttmálarnar á økinum. Fyrsti sáttmálin, sum arbeitt verður við í 2012, er sáttmálin við Serlæknafelag Føroya. Samráðingarnevndin stendur fyri samráðingunum.

## KT-skipan

- Ynskiligt er, at fáa flestu skipanir í eina felags brúkaraflatu. Eina skipan, sum eisini er meira brúkaravinarlig. Eina skipan, har borgarin kann avgreiða fleiri av sínum viðurskiftum umvegis heimasíðu stovnsins. Byrjað varð við hesum arbeiðinum í 2011, og vónandi fyriliggur eitt álit við eini kostnaðarmeting í 2012.
- Í 2011 var ætlanin at menna eina skipan soleiðis, at telduskipanin hjá kommunulæknunum, Cosmic, tøkniliga kann samstarva við nýggja heilsutrygdarprógvið. Hetta bleiv av ongum, tí játtanin varð skerd. Eftir ætlan verður ein skipan ment uttanfyri Cosmic, sum tó kann samskifta við Cosmic. Arbeiðið byrjar í 2012 og skal eftir ætlan verða liðugt í 2013.
- Í 2011 varð ætlanin eisini framhaldandi at menna eina skipan í sambandi við heilsutrygdarprógvið, alt eftir fíggjarligu orkuni. Nakrir fundir vóru, men vegna skerda játtan, kom onki ítøkiligt burturúr. Ætlanin er at arbeiða víðari við hesum í 2013.
- Heilsutrygd hevur í september 2011 fingið brúkararættindir til skipanina Cosmic. Cosmic er ein talgild telduskipan, sum verður umsitin av Talgildu Heilsuskipanini THS. Í skipanini verða allar læknaligar viðgerðir og avgerðir skrásettar. Eisini verða allar rokningar frá kommunulæknum gjørdar í Cosmic. Hetta fer at gera umstøðurnar fyri neyvari hagtølum o.ø. munandi lættari og betri. Frá 1. januar 2012 ætlaði Heilsutrygd at krevja, at allir kommunulæknar sendu samlirokningar úr Cosmic. Hetta skuldi gerast sum liður í samstarvinum við Kommunulæknaskipanina undir Heilsumálaráðnum. Arbeiðið hevur gingið seinni enn ætlað, og var ikki klárt 1. januar 12. Ætlanin er í 2012 at koma har til, at Heilsutrygd tekur samlirokningar frá øllum kommunulæknum úr Cosmic.
- Seta hol á arbeiðið at menna eina talgilda skipan, sum ger tað møguligt eftir stuttari tíð at veita landsmyndugleikum, øðrum stovnum og ráðum ráðgeving og vegleiðing .
- Menna eina Web-loysn til avgreiðslu av fótarøkt, har borgarin og fótterapeuturin kunnu logga seg á. Hetta er ein skipan, sum ikki er serliga kostnaðarmikil, og sum fer at lætta um hjá Heilsutrygd.
- Menna eina Web-loysn vil avgreiðslu av brillustuðli, sum inniber, at ymsu brilluseljararnir kunnu logga seg á og senda samlirokning t.d. eina ferð um mánaðin. Hendan skipanin er heldur ikki serliga kostnaðarmikil, og fer eisini at lætta um hjá Heilsutrygd.

## Starvsfólkamenning

- Heilsutrygd raðfestir starvsfólkamenning og starvsfólkarøkt sera frammarlaga, tí vit meta hetta sum eina avgjørda fyritreyt fyri trivnaðin og jaligari menning.
- Heilsutrygd hevur gjørt av at seta í verk eina skipan við trivnaðar- og starvsfólkamenning, har øll starvsfólk árliga skulu til eina trivnaðar- og starvsfólkasamrøðu.
- Heilsutrygd virkar fyri at veita øllum starvsfólkum góðar møguleikar fyri fakligari og persónligari menning og skeiðum, sum styrkja um førleikan.
- Heilsutrygd skipar fyri temadøgum og upplæring. Harumframt verða starvsfólk eggjað til at luttaka á viðkomandi skeiðum og temadøgum.
- Heilsutrygd leggur dent á at menna ávísar starvsførleikar, fyri at kunna veita brúkarum betri tænastu á ymsum økjum
- Heilsutrygd ger mannagongdir á flest øllum økjum. Hesar verða lagdar á felags drev, og er at meta sum starvsfólkahandbók hjá øllum starvsfólkunum.



## Heilsutrygdarprógv

Lógin um almenna heilsutrygd ásetur, at allir borgarar í Føroyum, skuldu hava eitt heilsutrygdarprógv í 2013.

Heilsutrygd væntar at fáa umboð í starvsbólk, sum skal arbeiða við hesum nýggja kortinum.

## Verkætlan í 2012

Heilsutrygd koyrir í dag við fleiri telduskipanum:

- Navision
- FIGS
- Info Organizer
- Cosmic
- Búskaparskipan Landsins
- Office pakkanum

Navision skipanin verður nýtt til at skráseta, hvør hevur hvønn kommunulækna, og til avrokning av basisgjaldi til kommunulæknar. FIGS skipanin verður nýtt til útgjald av smærri upphæddum til privatfólk, so sum brillustuðul, ferðastuðul og gravarhjálp.

Info Organizer er journalskipan.

Cosmic er talgild heilsuskipan, sum Heilsutrygd júst hevur fingið brúkaraatgongd til. Ætlanin er, at Heilsutrygd skal taka allar kommunulæknarokningar úr hesi skipan vikuliga eftir 01.07.2012. Ætlanin er eisini, at Heilsutrygd í Cosmic skal skráseta, hvør hevur hvønn lækna, umframt at broyta takstir á veitingum, tá hesir broytast. Meiningin er eisini, at skipanin framyvir skal brúkast til at avrokna basisgjald til kommunulæknar og til at gera hagtøl burturúr.

Búskaparskipan Landsins brúkar Heilsutrygd til bókhalds- og roknskaparskrásetingar.

Officepakkin verður brúktur til tekstviðgerð, rokniark, teldupost o.a.

Samanlagt er her talan um alt ov nógvar skipanir, sum hava við sær avleiðingar við meira arbeiði, sum t.d. dupultskrásetingar o.a.

Arbeitt skal verða við at finna fram til helst eina felags skipan ella fleiri smærri skipanir, sum umvegis eina brúkaraflatu fær allar skipanirnar at samskifta.

Hetta krevur eina krav- og raðfesting, nærri kanning, tíðarætlan, kostnaðarmeting o.a. Hesum arbeiði vónar Heilsutrygd at koma væl áleiðis við í 2012.

## Heimasíða

Heimasíðan varð løgd út í apríl 2011. Arbeitt verður við at ajourføra hana og at gera hana betri fyri brúkaran. Eisini er ætlanin at tillaga heimasíðuna soleiðis, at brúkarin kann avgreiða nøkur av sínum viðurskiftum við stovnin umvegis heimasíðuna. Nevnast kunnu umsóknir um brillustuðul, ferðastuðul, gravarhjálp, fótarøkt, val av lækna, bóka tíð hjá lækna o.a.

## Talva yvir virksemið hjá Heilsutrygd í 2012

| Endamál | Støða | Mál í 2012 | Tiltøk/Avrik | Mettur kostnaður |
|---|---|---|---|---|
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Menna Heilsutrygd til ein vælvirkandi sjálvstøðugan stovn | Stovnurin avgreiðir síni viðurskifti, men enn vantar at menna ymiskar sjálvstøðugar skipanir og funktiónir | Gera nýggjar mannagongdir á økjum, har hesar enn resta í | Heilsutrygd koyrir á Landsnet<br><br>Hugsað verður serliga um trygdartiltøk innan KT, váðameting viðv. upplýsingum og KT-nýtslu, orðað ein trygdarpolitik og at gera mannagongd fyri at finna fram til vandarnar fyri sviki | Innliman: Útreiðsluneutralt. Árligt gjald: 750 kr. pr. teldu pr. mðr.<br><br>Útreiðsluneutralt |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Heilsutrygdarprógv | Lógarbroyting verður gjørd, sum ásetur, at allir føroyingar skulu hava heilsutrygdarprógv í 2013 ístaðin fyri 2011. Hetta nýggja prógvið verður partur í eini størri skipan við m.a. talgildari undirskrift | Helst verður bólkur settur, mannaður av HMR og øðrum ráðum, sum skal arbeiða við próvnum. Heilsutrygd væntar at fáa umboð í bólkin | Finnast skal fram til, hvat kortið skal kunna brúkast til, hvar tað skal brúkast, hvussu tað skal brúkast, kostnað fyri kort og skipanir, útsjónd o.m.a. | Kenna ikki kostnaðin, men helst verður talan um nakrar mió. kr. |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Kommunulæknaskipan | Talgilda Heilsuskipanin Cosmic er á heysti 2011 løgd inn hjá Heilsutrygd | Brúka skipanina til skráseting av, hvør hevur hvønn lækna, gera rættingar í veitingar-gjøldum, tá hesir broytast, vikuliga taka út kommunulæknarokningar, avrokna basisgjald, gera hagtøl o.a. | Upplæra starvsfólk at brúka skipanina, gera modellir til hagtøl o.tl., evt. tillagingar | Ongar beinleiðis útreiðslur |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>HR – menning<br><br>Heilsutrygd ynskir at vera eitt familjuvinarligt, jaligt og mennandi arbeiðspláss í samsvar við galdandi almennan starvsfólkapolitikk | Heilsutrygd raðfestir starvsfólkarøkt- og menning frammarlaga | At øll starvsfólk eru til árligar menningar- og starvsfólkasamrøðu.<br><br>Starvsfólkahandbók verður gjørd, og verður løgd á felagsdrevið | Skipa samrøðurnar um heysti.<br><br>Tillagað starvsfólkahandbøkur | 20.000 kr.<br><br>Útreiðsluneutralt |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Roknskaparreglugerð | Roknskaparreglugerðin er gjørd og góðkend av Heilsumálaráðnum í 2011 | At roknskaparreglugerðin er dagførd | Tillagaða roknskaparreglugerðin verður løgd fram og gjøgnumgingin saman við starvsfólkunum.<br><br>Reglugerðin verður dagførd samsvarandi broytingum á stovninum, umframt virkisøkið og yvirskipaðu fyrisetingunum annars | Útreiðsluneutralt<br><br>Útreiðsluneutralt |

| Endamál | Støða | Mál í 2012 | Tiltøk/Avrik | Mettur kostnaður |
|---|---|---|---|---|
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Finna egnaði hølir til virksemið til langtíðar nýtslu | Leigusáttmáliin varð gjørdur og góðkendur í mars / apríl 2011. Útleigarin megnaði ikki at fáa hølini klár, og tí er sáttmálin skrivliga uppsagdur | Finna egnaði hølir til langtíðarleigumál, og gera sáttmála um leigu | Um tað ikki eydnast at gera langtíðarleigu-sáttmála í 2011, verður hesin at gera tíðliga í árinum 2012 | Leigan verður uml. 20-30.000 kr. pr. mðr + el og olju |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Stovnurin er nýggjur, og skal hava neyðugt innbúgv | Fyribilshølini vit eru í vóru møbleráð, tá vit fluttu inn | Keypa neyðugt innbúgv og neyðuga útgerð | Útvega tilboð og keypa tað, sum neyðugt er | Umleið 100 tkr. |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Heimasíða | Heimasíðan varð løgd út í apríl 2011. Heimasíðan skal vera upplýsandi og tað skal m.a. bera til at útskriva oyðubløð | Menna heimasíðuna enn betur, so hon verður meira brúkaravinarlig. Tað skal eisini bera brúkaranum til at avgreiða nøkur av sínum viðurskiftum umvegis heimasíðuna | Gera kravfestingar og fremja nøkur av málunum í verki | Umleið 50.000 kr. |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Endurnýggja sáttmálar og samráðast um nýggjar sáttmálar við fakfeløg | Heilsutrygd hevur dagligt samskifti við fakfeløg um sáttmálaviðurskifti | Fáa gongd á samráðingar við nøkur av hesum fakfeløgunum.<br><br>Samráðingarnar ganga umvegis Samráðingar-nevndina, har Heilsutrygd hevur umboð | Tað liggur hjá Samráðingarnevndini at gera av, nær samráðingarnar verða | Kenna ikki kostnaðin |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Kommunulæknar senda rokningar úr Cosmic | Enn senda nakrir kommunulæknar manuellar rokningar, har teir leggja við tær smáu rokningarnar, har kundin hevur skrivað undir | Frá 01.07.2012 ætlar Heilsutrygd, at allar rokningar frá kommunulæknum skulu takast úr Cosmic | Heilsutrygd ætlar vikuliga at taka niður rokningar frá kommunulæknum úr Cosmic skipanini, at fremja eftirlit út frá Cosmic og gera stakroyndir fyri rættleika | Kenna ikki kostnaðin |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Apotekini stýra tilskotinum til heilivág | Tá borgarar keypa tilskotsheimilaðan heilivág, eru tað apotekini, sum draga tilskotið frá, og senda rokning til Heilsutrygd ultimo hvønn mánað | Skrivlig avtala varð gjørd við Landsapotekaran 14.04.2011.<br>Smb. avtaluni kann Heilsutrygd gera eftirlit av avtaluni | Í oktober gera stakgreinaeftirlit av 2011 og 2012 skrásetingum | Útreiðsluneutralt |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Kommunulæknar | Heilsutrygd móttekur hvørja viku rokningar frá kommunulækunum fyri farnu vikuna | Heilsutrygd ætlar at fremja stakgreinaeftirlit av 2011 skrásetingum | Eftirlitið verður í mai/juni | Útreiðsluneutralt |

| **Endamál** | Støða | Mál í 2012 | Tiltøk/Avrik | Mettur kostnaður |
|---|---|---|---|---|
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Serlæknar | Heilsutrygd móttekur rokningar frá serlæknunum nøkulunda regluliga | Heilsutrygd ætlar at fremja stakgreinaeftirlit av 2011 skrásetingum | Eftirlitið verður í september | Útreiðsluneutralt |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Fysioterapeutar | Heilsutrygd móttekur rokningar frá fysioterapeutum regluliga | Heilsutrygd ætlar at fremja stakgreinaeftirlit av 2011 skrásetingum | Eftirlitið verður í mai | Útreiðsluneutralt |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Kiropraktor | Heilsutrygd móttekur rokningar frá kiropraktorum regluliga | Heilsutrygd ætlar at fremja stakgreinaeftirlit av 2011 skrásetingum | Eftirlitið verður í apríl | Útreiðsluneutralt |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Ergoterapeutar | Heilsutrygd móttekur rokningar frá ergoterapeutum nøkulunda regluliga | Heilsutrygd ætlar at fremja stakgreinaeftirlit av 2011 skrásetingum | Eftirlitið verður í apríl | Útreiðsluneutralt |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Sálarfrøðingar | Heilsutrygd móttekur rokningar frá sálarfrøðingum regluliga | Heilsutrygd ætlar at fremja stakgreinaeftirlit av 2011 skrásetingum | Eftirlitið verður í mai | Útreiðsluneutralt |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Fótterapeutar | Heilsutrygd móttekur regluliga rokningar frá fótterapeutum | Heilsutrygd ætlar at fremja stakgreinaeftirlit av 2011 skrásetingum | Eftirlitið verður í juni | Útreiðsluneutralt |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Netsamband | Netsambandið og ferðin á sambandinum er alt ov veik, sein og svikalig.<br>Alt ov ofta verður sambandið til fílar og mappur burtur.<br>Fyri at koyra nøktandi, krevur Cosmic eina sera stutta svartíð. Svartíðin í dag er í besta fall 4-5 ferðir ov long | Fáa eina nøktandi ferð, og finna, hvar feilurin liggur | Rætta feilin og gera neyðug tiltøk | Kenna ikki kostnaðin |
| **Fyrisitingarlig viðurskifti:**<br><br>**Telduskipan** | Heilsutrygd hevur í dag ov nógvar telduskipanir. Hetta ger, at tað eru ov nógvar dupultskrásetingar og harav eykaarbeiðir. | Greinað tørv og krøv til nýggja telduskipan, har smærri skipanir tosa saman umvegis felags brúkaraflatu. | Skriva álit og gera kostnaðarmeting | Kenna ikki kostnaðin |

| Endamál | Støða | Mál í 2012 | Tiltøk/Avrik | Mettur kostnaður |
|---|---|---|---|---|
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Telduskipan | Allir borgarar skulu sbrt. lóg hava heilsutrygdarprógv í 2013.<br>Í fyrstu atløgu er ætlanin, at kortið skal kunna brúkast í kommunulæknaviðtalum | Byrja at fyrireika skipan, sum ger, at heilsutrygdarkortið og kommunulæknaskipanin Cosmic kunnu samskifta | Byrja arbeiðið í 2012, og eftir ætlan gerast liðugt í 2013, tá kortið sbrt. lóg verður útgivið | Kenna ikki kostnaðin |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Telduskipan | Heilsutrygd hevur í dag fleiri skipanir, sum eru "arvaðar" frá sjúkrakøssunum | Byrja fyrireikingar-arbeiðið sum skal til, fyri at menna eina talgilda skipan til stovnin. Tankin er nakrar smærri skipanir, sum samskifta umvegis eina felags brúkaraflatu | Byrja at arbeiða við at greina tørv, krøv, treytir, raðfesting, tíðarætlan, kostnað o.a. | Kenna ikki kostnaðin |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Telduskipan | Avgreiðslan av fótterapeutum, sum í dag er sera tíðarkrevjandi og manuell | Fáa nýggja skipan til avgreiðslu av fótterapeutum | Gera eina web-loysn, sum lættir munandi um avgreiðsluna av fótterapeutum | 60.000 – 70.000 kr. |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Telduskipan | Avgreiðslan av brillustuðli er í dag sera tíðarkrevjandi og manuell | Fáa nýggja skipan til avgreiðslu av brillustuðli | Gera eina web-loysn, sum lættir munandi um avgreiðsluna av brillustuðlinum | 60.000 – 70.000 kr. |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Kunngerðir | Enn mangla fleiri kunngerðir til lógina um heilsutrygd at gera og lýsa | Fáa gjørt og lýst so nógvar av manglandi kunngerðunum sum gjørligt | Heilsutrygd taka lut í at smíða manglandi kunngerðirnar | Útreiðsluneutralt |
| Kjarnuøki 1:<br><br>Avgreiðslur, sum áður hoyrdu undir gomlu sjúkrakassaskipanina | Avgreiðslurnar ganga væl, men onki er so gott, at tað ikki kann gerast betur | Gera smidligari mannagongdir, og arbeiða fram ímóti meir talgilding av skipanum. M.a. er ætlanin at fáa allar kommunulæknar at skráseta allar rokningar í Cosmic frá 01.01.2012 | Frá 01.01.2012 ætlar Heilsutrygd vikuliga at taka niður kommunulæknarokning ar úr Cosmic. Samstundis verður miðað eftir, at eftirlitið ikki longur er á pappíri, men umvegis Cosmic | Kenna ikki kostnaðin |
| Kjarnuøki 1:<br><br>Profylaksar | Umsitingin av profylaksum er í dag í Heilsumálaráðnum | Fáa avklárað, um umsitingin av profylaksum framyvir skal umsitast í Heilsumálaráðnum ella á Heilsutrygd | Heilsumálaráðið má taka avgerð í málinum. Um umsitingin av profylaksum verður flutt, verður játtanin eisini flutt | Kenna ikki kostnaðin |

| Endamál | Støða | Mál í 2012 | Tiltøk/Avrik | Mettur kostnaður |
|---|---|---|---|---|
| Kjarnuøki 2:<br><br>Fysioterapi | Gamli sáttmálin má tillagast | Arbeitt verður við at gera tilmæli um nýggjan sáttmála | Fáa tilmælið liðugt, og møguliga gera nýggjan sáttmála | Kenna ikki kostnaðin |
| Kjarnuøki 2:<br><br>Fótterapeutisk viðgerð | Ongin sáttmáli er á økinum. Heilsutrygd er í dialogi við fótterapeutarnar, fyri at fáa viðurskiftini formaliserað | Uppskot er gjørt til kunngerð, men hon er enn ikki lýst | Lýsa kunngerðina og møguliga eisini gera sáttmála á økinum | Kenna ikki kostnaðin |
| Kjarnuøki 2:<br><br>Hjálparráð | Hjálparráð verða í dag umsitin av Heilsutrygd, hóast største parturin verður avgreiddur av goymsluni á Landssjúkrahúsinum | Fáa avklárað, um tey hjálparráð, sum eru á goymsluni á Landssjúkrahúsinum, framyvir skulu umsitast av Heilsutrygd ella av Landssjúkrahúsinum | Heilsumálaráðið má taka avgerð í málinum. Um umsitingin av ávísum hjálparráðum verður flutt, verður játtan eisini flutt | Kenna ikki kostnaðin |

## Sáttmálaskeið

Hesin sáttmálin er galdandi fyri árið 2012.

Eftirmeting verður gjørd saman við aðalstjóranum í Heilsumálaráðnum á heysti 2012.

Tórshavn, hin 14. mai 2012

**Heilsutrygd**

______________________________

Jan Danielsen, stjóri

**Heilsumálaráðið**

______________________________

Poul Geert Hansen, aðalstjóri